# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Broytingar tykjast sannlíkar

**Mikkjal Thomassen, Arnbjørn Hansen og Herbert í Lon Jacobsen eru millum mest óvæntaðu kortini, sum Jógvan Martin Olsen hevur spælt á borðið til komandi landsliðs-avbjóðingarnar**



*Tað man vera lítil ivi um, at landsliðsvenjarin hevur ætlanir um gera nýtslu av Mikkjal Thomassen, sum ikki hevur verið í landsliðsmyndini seinastu 10 árini*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Breið semja er í føroyska fótbóltsheiminum um, at avrikini hjá fótbóltslandsliðnum ikki hava verið nóg góð, síðani Jógvan Martin Olsen tók við starvinum sum landsliðsvenjari.

Stórur partur av ákoyringunum hava verið vendar beinleiðis móti venjaranum, sum hinvegin langt síðani hevur gjørt greitt, at tað fór at kosta, at útskiftingin í hópinum er og hevur verið stór seinasta góða árið.

### Mikkjal sleppur á vøllin

Júst stóra útskiftingin hevur tó eisini havt við sær, at fleiri spurnartekin eru sett við úttøkurnar, sum kanska í ov stóran mun eru bygd á spælarar uttan altjóða royndir.

Til landsdystin í Skotlandi var vantandi rutinan á liðnum helst eisini ein tung orsøk til, at Julian S. Johnsson varð tikin við í hópin. Og tað skal uttan iva síggjast í sama ljósið, at Mikkjal Thomassen er millum nýggju nøvnini í hópinum hesaferð.

Í fyrstu syftu er talan um 22 manna hóp, og tríggir av hesum verða helst sáldaðir frá, áðrenn dystin móti Litava. Á dómaraseðlinum er so bara rúm fyri 18, og alt annað líka verður Óli Johannesen aftur í hópinum móti Fraklandi, tá leikbann hansara er runnið.

Men tað er lítið sannlíkt, at landsliðsvenjarin tekur 30 ára gamla Mikkjal Thomassen út, uttan at ætlanin er at brúka hann. Á landsliðnum hevur Mikkjal ikki gjørt tað stóra um seg, síðani eina ávisa hending fyri fleiri árum síðani. Men tað er eingin ivi um, at hann hevur fleiri av dygdunum, sum landsliðnum hevur vantað seinastu ferðirnar. Á liðnum hjá B36 hevði hann bæði í ár og í fjør týðandi leiklut í góðu europisku úrslitunum.

### Eitt pláss í verjuni

Tí kann roknast við, at teir tríggir, sum skulu sáldast frá, eru at finna millum hini fýra nýggju andlitini. Tað tykist heilt greitt, at antin Rasmus Nolsøe, Herbert í Lon Jacobsen ella Marni Djurhuus taka plássið í hópinum, sum er tókt eftir leikbannið til Óla, og tí kann roknast við, at tveir av hesum bert sleppa at snodda til landsliðið hesaferð.

Og tað er sannlíkt, at tað sama verður galdandi fyri Arnbjørn Hansen. Áleyparin hjá EB/Streymi, sum ivaleyst er gott boð upp á heitið sum ársins stjørnuskot, líkist í mangar mátar tí typiska áleyparanum, sum føroyskur fótbóltur hevur saknað í fleiri ár. Men enn eru royndirnar tó sera fáar, og tí kann hugsast, at ætlanin við hesi úttøkuni er, at ungi maðurin spakuliga verður slúsaður inn í hópin.

Soleiðis hevur EB/Streymur nú tríggjar spælarar í hópinum. Og so kann leggjast afturat, at fjórði maðurin neyvan er langt burturi. Bárður Olsen var partur av hópinum til teir báðar seinastu landsdystirnar, men hann er skaddur í løtuni.

## Hópurin

| | |
|---|---|
| Meinhardt Joensen | KÍ |
| Atli Danielsen | KÍ |
| Vagnur M. Mortensen | HB |
| Rasmus Nolsøe | HB |
| Kári Nielsen | HB |
| Rógvi Jacobsen | HB |
| Jákup á Borg | HB |
| Janus M. Joensen | HB |
| Arnbjørn Hansen | EB/S |
| Marni Djurhuus | EB/S |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ |
| Julian S. Johnsson | B68 |
| Símin Samuelsen | Keflavík |
| Jákup Mikkelsen | B36 |
| Mikkjal Thomassen | B36 |
| Fróði Benjaminsen | B36 |
| Hanus Thorleifsson | B36 |
| Herbert í Lon Jacobsen | B36 |
| Óli Johannesen | TB |
| Jónhard Fredriksberg | Skála |
| Pauli G. Hansen | Skála |

## Vildi hoyra feløgini

Óli Holm, FSF-forseti, vísir staðiliga aftur, at talan er um ósemju innan FSF í tí, sum varð nevnt í blaðnum í gjár viðvíkjandi møguligari bygging eystaru megin Tórsvøll.

- Fyrst og fremst, so er talan ikki um nakað nýtt mál. Hetta hevur verið viðgjørt fleiri ferðir á nevndarfundi, og tað er ein náttúrligur spurningur hjá FSF at seta sær, tí helst verða vit eisini partur av framtíðini hjá Tórsvølli.

- Og at málið verður tikið upp á formansfundi er eisini púrasta náttúrligt. Formansfundirnir eru jú eitt upplagt høvi hjá nevndini at lodda dýpið millum feløgini. Tí var talan á ongan hátt um eitt uppskot frá FSF, men um eitt mál, har vit eisini vilja hava feløgini at taka geva síni sjónarmið til kennar.

Í greinini í gjár varð róð framundir, at formaðurin ikki hevur uppbakning í FSF-nevndini fyri tí, sum varð lagt fram, men hetta er nakað, sum formaðurin afturvísir.

- Tað, sum varð lagt fram, er í tráð við tað, sum nevndin hevur tosað um. Og tað ørkymlar meg, um onkur hevur fingið eina øðrvísi fatan av tí spurninginum, sigur Óli Holm.

### Yvirdekkað VIP-økið

Hartil heldur Óli Holm, at onkur á fundinum man hava fingið boðskapin heldur skeivt í hálsin, um hildið verður, at FSF við hesum hevur lagt upp til, at tak skal leggjast á alla eystaru síðu.

- Tað, sum var fyri á fundinum, var møguleiki at FSF yvirtekur ábyrgdina av VIP-økinum eystaru megin Tórsvøll. Hetta við at byggja nýggj hús – ella møguliga víðka um verandi – soleiðis at tak verður oman yvir teimum áskoðaraplássunum. Og sjálvandi vilja vit lurta eftir tí, sum feløgini hava at siga í hesum spurninginum.

**-mørk**

## Taka avbjóðingina upp

Mikkjal Thomassen og Arnbjørn Hansen eru tvey av nýggju andlitunum, sum í næstum møta til landsliðsvenjingar. Hvør leiklutur teirra verður, er helst trupult at spáa, men tá vit tosaðu við spælararnar, løgdu báðir dent á, at teir taka hetta sum stórt herðaklapp.

- Eg velji í øllum førum at taka hetta sum eina sera positiva avbjóðing, og sjálvandi fegnist eg um úttøkuna. Hvussu leikur so víðari ferð, ber ikki til at siga, men eg haldi í øllum førum, at venjararnir báðir í B36 eiga stóran lut í hesum, sigur Mikkjal Thomassen.

Og eisini Arnbjørn Hansen hevur hug at geva sínum venjarum stóran part av góðu gongdini hjá sær hetta kappingarárið.

- Tað eru jú Piotr og Sámal Erik, sum hava givið mær møguleikan í EB/Streymi, har eg havi fingið nógva spælitíð í ár. At eg so eisini havi fingið hesa álitisváttanina merkir væl, at eg havi gjørt okkurt rætt.

- Ivaleyst hevur tað eisini sítt at siga, at tað hevur gingist liðnum so væl, tí tað eru jú viðspælararnir, sum skapa pláss til mín á vøllinum.

**-mørk**